Sosiologurin Bourdieu farin

Franski intellektuelli risin, sum tordi at venda sær móti tí skaðiligu globaliseringini og vísti á, at nýliberalisman, sum frálíður, bara gagnar amerikonsku imperialismuni, og ger, at vit avreiða øll okkara fíggjarrættindi og geva multinationalum kapitalvaldi heilt fríar hendur til at eyðræna og mergsúgva restina av heiminum

Virgar T. Dalsgaard

Tann 24. januar 2002 doyði ein av mætastu, men fyrst og fremst djarvastu samfelagsfrøðingum eftir seinna heimsbardaga, franski sociologurin og filosoffurin, Pierre Bourdieu, 71 ára gamal.

Franski statsministarin, javnaðarmaðurin Lionel Jospin segði í minnisrøðu síni um Bourdieu, at eitt flogvit innan sociologiska vitskapin og ein stórur franskur tonkjari var farin.

Bourdieu gjørdis longu í 1958 professari í samfelagsvitskapi við Universitetið í Alger, høvuðsstaðnum í norðuraftrikanska landinum Algier, sum tá enn var partur av fronskum mentakringi. Fyrst í 80-unum varð hann útnevndur professari í sociologi við Collége de France í París, har hann eitt stutt skifti kom at arbeiða saman við tí kontroversiella og heldur løgna filosoffinum og sálarfreðinginum, Michel Foucault, sum doyði í 1984. So ymiskir sum hesir hugsarar annars vóru, hevur allarhelst verið mikil sínamillum ávirkan teirra millum. Hetta er tað, menn nevna dialektikk!

Filosofiskur talsmaður hjá smáfólki

Sum sociologur hevði Bourdieu risastórt flog. Hann hevði sjáldsama stóra vitan á flestøllum økjum, eitt nú etnologi, antropologi, jura, pedagogikki, málfrøði, list, átrúnaði, matematikk og fíggjarfrøði. Hetta gav honum góðar møguleikar fyri at analysera samfelagsins kompleksu mekanismur heilt út í æsir, bæði sum metodiskur vísindamaður og sum slóðbrótandi kultursociologur.

Hóast hann var objektivur granskari, ræddist Bourdieu ongantíð fyri at viðganga, at hann ynskti tilverubroytingar fyri tey veikastu; – hann var nevniliga socialistur og fírdi ikki fyri at luttaka í samfelagsdebattini, og sjálvt um bæði kanningar og analysur hansara vóru so objektivar, sum samfelagskanningar kunnu blíva, so vóru metodurnar persónligar, og konklusiónirnar ofta subjektivar. Andaliga er hann nærskyldur við týska filosoffin Habermas, men hann grevur djúpri og er nógv djarvari. Hann gerst heitur talsmaður fyri, at akademiskt virksemi eigur at vera samfelagsrelevant. Sociologiska vísindin skal ikki bara avdúka, men eisini loysa vandamálini hjá teimum, sum eru ringast stødd. Hann verður næstan akademiskur umboðsmaður hjá teimum gloymdu, burturskúgvaðu og heimleysu – Bourdieu átti sanniliga sociala indignatión!

Av beiskum royndum var sannføring hansara, at ein sociologur ikki kann vera kaldur og óengageraður yvirfyri armóð, neyð og líðilsi hjá teimum, sum ikki hava nakran talsmann, ella sum sjálvi ikki eru ment at argumentera!

Hetta er heilt í samsvar við Marx, sum í síni tíð helt fyri, at higartil hava filosoffar roynt at forklára verðina, – tað, sum umrædur, er at broyta hana!

Bourdieu var tiltikin fyri at vera nærlagdur, erligur og grundigur í síni vitskapsmetodu, og tað sigst, at síðani Marx hevur fáur ferðast á størri samfelagsdýpi enn júst Bourdieu.

Av ørgrynni av bókum frá hesi tíðini kunnu m.a. nevnast La reproduction (1970) og La Distinction (1979).

Gera maktmonopolin demokratiið til eina illusión?

Landsmaður hansara, Montesquieu gjørdist gitin fyri sínar metingar av makthavarum, maktsjúkum og maktmisbrúki miðskeiðis í 18. øld. Filosoffurin Montesquieu helt fyri, at hvør tann sum hevur vald ella fær litið vald upp í hendur, fer fyrr ella seinni at misbrúka valdið. Júst tvær øldir seinni fara Habermas og Bourdieu at analysera maktstrukturin í háídnaðarsamfelogum. Bourdieu er meira miðvísur enn Habermas og sóknast ikki bara eftir orsøkum til tað sociala maktbýtið. Hann kannar nágreiniliga lívsstíl hjá øllum samfelagsbólkum, og hvussu subtilar treytirnar ofta eru fyri opnum, – og serliga fjaldum maktbrúki ella maktstremban frá ávísum bólkum, klikum ella familjum. Tey fløkjasligu maktviðurskftini í samfelagnum gera oftast demokratiið til eina hvørvisjón og keipumynd. Ávirkan og avgerðir verða alt minni demokratiskar og tíðum monopoliseraðar av sonevndum ekspertum.

Tað eydnaðist Bourdieu at menna ta sociologisku vísindina, soleiðis, at hon kundi greina tað ovurfløkta sambandið, sum í einum nútímans teknologiskum samfelagi er millum einstaklingin og tað turbulenta umhvørvið. Her fer hann so langt, at hann næstan dissekerar alt tað sociala samskiftið, viðhvørt heilt niður í minstu samfelags-celluna, sovikamarið!

Hann fór tíðliga at kanna orsøkina til, at social kúgan og fíggjarlig trælkan ofta arvast frá ættarliði til ættarlið. Hann analyserar og dokumenterar nágreiniliga, hvussu sociala sorteringin, sjálvt í ovurríkum samfelogum, stendur við ella versnar, og hví sociala sundurbýtingin verður varðveitt, ofta við meira ella minni óbeinleiðis góðkenning ella "stuðli" frá teimum "kúgaðu".

Hann dokumenterar við risastórum tilfari, at gerandishugsanir, vanar og hugmyndir, stutt sagt mentan okkara og lívsstílur eru við til at káma og krógva bæði tað fíggjarliga- og tað politiska maktmisbrúkið hjá teimum ráðandi stættunum.

Munur er á monnum

Tá ið Berlinmúrurin bóltaði í 1989, kom fjáltur á nógvar menn, og summir sociologar eins og aðrir intellektuellir mistu nervarnar og tagnaðu. Aðrir gjørdust nærmast líkaglaðir opportunistar og fóru at laga seg til tann nýggja samfelagsmótan, nýliberalismuna. Hetta kann fyri ein stóran part sigast um populistiska mótasociologin, onglendingin, Anthony Giddens. Men ikki um Bourdieu, hann var eingin vingliskoltur og stóð við sínar áskoðannir, og hví skuldi hann ikki tað? Sjálvt um tað korrupta sovjet-stýrið var farið av knóranum, var órætturin í heiminum tann sami.

Bordieu metti sum eingilski socialisturin í síni tíð, at sjálvt um elektrikarin er eitt eiðasørt klombur, so fer fáur tessvegna at halda uppat at brúka elektriska orku!

Bordieu hevði líka lítið, sum vit aðrir, nakrantíð hildið, at tað fór at vera tað kavrotna kommunistiska valdsimperiið, sum fór at loysa trupulleikarnar hjá milliardfjøldini av forfjónaðum. Hann var framvegis gløðandi socialistur, og hevði stóra vanvirðing fyri, at sjálvt fyrrverandi frelstir salónkommunistar sóust renna ørindi fyri ta multinationalu kapitalismuna í 90-unum.

Men Bourdieu verður ongantíð til keyps! Tvørturímóti. Hann vil avromantisera tað karráu liberalu samfelagsmyndina. Hann allierar seg við eina rúgvu av ungum óspiltum sociologilesandi, sum fara út í hvønn krók heilt úti undir væðingini í franska samfelagnum og gera eitt risastórt kanningararbeiði eftir hansara ráðum og forskriftum. Nú verður spillnakni veruleikin hjá heimleysum, tilflytarum, einligum, arbeiðsleysum o.fl. enn einaferð dokumenteraður við lít.

Úrslitið kemur út í bókini "La Misére du Monde" (1993), og her kemur í ljósmála, at tann ovurmodernaða supereffektiva franska kapitalisman ikki bara framleiðir háteknologi, men eisini producerar ómegd, einsemi, resignatión, marginalisering og beiskt vónsvik hjá vanligum fólki. Harumframt eru í hundraðtúsundatali av menniskjum, sum verða heilt skúgvaði til viks, tí tey ikki hava tær neyðugu "kvalifikatióniir". Tey hava ikki útbúgving til at vera borgarar ella menniskju í franska samfelagnum.

Í multinationalum andgletti

Ongar menniskjansligar millumrokningar eru ov lítisverdar ella vesælar fyri Bourdieu, og eingi viðurskifti manna millum eru so smá ella fátækslig, at hann ikki heldur tað vera vert at kanna og viðgera. Tað er altso ikki bara sjálvan stórviðin í samfelagnum, hann vil analysera, nei, hann tekur hvørja skrúvu og hvønn seym við.

Bourdieu hevur tí givið út hópin av bókum um alskyns evni, eitt nú umhvørvismál, feminismu, móta, lívsstíl, ítrótt, barnaansing, brúkaraviðurskifti, familjumál o.s.fr. Summar av hesum bókum eru meira politiskar enn tær fyrrnevndu, men bæði forvitnisligar og vælskrivaðar.

"Móteldur" er seinasta bókin, sum komin er á donskum. Í henni argumenterar hann fyri, at intellektuell fólk í Europa fylkjast fyri at geva tí kapitalistisku globaliseringini nóg munagóða andstøðu og hartil royna at uppfinna eitt nýtt slag av politikki.

Hann vísir á, at monopolfeløgini hava til endamáls at bera allari mannaættini boðskapin um, at tann amerikanska fyrimyndin við sonevndum frælsum initiativi (free enterprise) er tað einasta rætta.

Hann ger eisini vart við, at risafyritøkurnar stórt sæð kunnu fáa makt yvir íbúgvarafjøldini í hvørjum einstøkum landi við at brúka ein heilan her av sonevndum ekspertum, ráðgevarum, lobbyistum og ikki minst journalistum. Á hesum seinastu – miðlamonnunum – hvílir ovurmikil ábyrgd, og tí hevur Bourdieu fremstafingur serliga rættan ímóti teimum, tí teir kunnu vera til fals og lætt freistast til at lata seg (mis)brúka til at skeikla og avlaga veruleikan, so hann kritikkleyst tænir amerikanska boðskapinum um vælsignilsi í (ó)fríum fyritakssemi.

Tað er bládýpi millum tann seriøsa Bourdieu og sociologiska roksið, Anthony Giddens, sum í 90-unum tíanverri gjørdist guru hjá eingilska javnaðarflokkinum, og serliga hjá Tony Blair. Úrslitið var, at flokkurin beit høvdið av allari skomm, blakaði næstan alla socialismu fyri borð og legði opportunistiskt til brots bara eftir at fáa maktina! Sagt verður, at tær hálu modernitetsanalysurnar hjá Giddens eru so flaksandi, at tær líka so væl kundu verið gjørdar av reklamumonnum hjá Coca-Cola ella Mercedes Benz.

Fáa vit eina globala feudal-skipan, har vit verða trælir?

Tann eirindaleysa globaliseringin er miðvíst við at skapa eina nýggja heimsumfatandi stættarskipan, har amerikanskar multinationalar fyritøkur verða lensmenn og restin av heiminum verða meira ella minni týðandi tegnar og vasallar. Tað eru í dag nógv dømi um, at amerikanskur kapitalur bara keypir upp europeiskar fyritøkur fyri seinni at steingja tær. Tað er, sum um vit eru sjálvdestruktiv og søkja sjálvbodnan trældóm. Liberalisma og fríhandil er bluff, tað kann ikki lata seg gera, táið partarnir ikki eru maktjavnir. Tað verður altíð sum at seta úlvin at spæla við lomb. Hetta eru fakfelagsmenn í teimum størru europeisku londunum so smátt farnir at varnast, men higartil hava eisini teir verið heilavaskaðir av nýliberalum møsni. Bourdieu var øgiliga vónsvikin av fakfelogunum, og vónaði tí, at tað skuldi vera tey intellektuellu, sum bjargaðu okkum frá maktmisbrúki og multinationalu sóttini. Har var hann helst ógvuliga naivur. Fyribils er ikki nógv, sum týðir uppá, at lombini varnast, enn minni ræðast úlvin.

Hugvekjandi er, at Bourdieu júst kom til tað erkennilsi, at tey "kúgaðu" ofta góðkenna órættin og næstan stuðla eyðræningini.

Hvussu er maktsjúkan um okkara leiðir?

Vit hava seinastu 14 dagarnar í Danmark í munandi minni formati sæð dømi um andskræmiligt maktmisbrúk, bæði kommunalt í FARUM og kultiskt/sekteriskt í TVIND-pyramiduni. Í báðum førum hevur tað næstan verið eftir uppskift frá Montesquieu og Bourdieu.

Men hvussu er nú í okkara lítla dunnuhyli? Hevur ikki verið maktmisbrúk í Føroyum hesi seinastu 4 árini? Ja, man skal vera bæði deyvur og blindur, um man ikki dugir at síggja beinleiðis analogi millum ræðumyndirnar hjá Bourdieu og so núverandi landsstýri øðrumegin og partar av embætisstætti og journalistum hinumegin. Samstundis sum sjakalar, ið fyrr fagnaðu øllum almennum virksemi og fordømdu tað privata, beinleiðis eru við at avreiða okkum til kyniskar multinationalar oljufyritøkur. Onkur fordømir tað almenna so harðmælt, at sjálvt borgarligir veljarar stúrsa við. Táið vesæla maður fær vald, kann hann sær ikki afturhald!

Hóast Bourdieu við sínum metodisku analysum arbeiddi við meira ella minni fjaldum maktstrukturum í risasamfelogum, so eru metodur hansara og teoriir vælbrúkiligar til at analysera tey meira opinlýstu maktviðurskiftini í tí lítla føroyska samfelagnum. Tað hevði klætt føroyskum samfelagsfrøðingum at farið í holt við ta uppgávuna, heldur enn at trútta við paranoidum møsni um danska kúging. Tað ber vel til at brúka amboðini hjá Bourdieu. Men tað krevur ikki sørt av dirvi.

Litteratur:

- Modild
- La Misére du Monde
- Fyrilestrar í Danmarks radio
- Donsk bløð
- Om TV og journalistikkens magt 1998
- Af praktiske grunde 2001
- Refleksiv socialogi 1996
- Opdragelse til det moderne 2000
- Krop og livstil 1993

VIÐMERKINGAR

Hvad er der egentlig galt med at videresælge fiskedage?

Søren Bruhn
Trangisvåg

Et af de nye elementer i forslaget om fiskedagesystemet er, at fiskerne nu skal bruge 60% af dagene. Det er et spørgsmål, hvad denne forbedring skal gøre godt for? Ideen er at begrænse mulighederne for spekulation i videresalg af fiskedage, men hvad er der egentlig galt i det?

Det betyder blot, at fiskerne bruger markedsmekanismen til at omfordele dagene mellem sig. Dermed har en fisker, som ønsker at være meget på havet, mulighed for at skaffe sig flere dage fra en anden fisker, som hellere vil være på land.

Denne omfordeling/handel med fiskedage sikrer dermed, at de fiskere, som har det største initiativ og den største betalingsvillighed, fordi de får mest ud af en fiskedag, kommer på havet. Dette er til fordel for det færøske samfund, idet den samlede fangst dermed bliver fanget med den mindste ressourceindsats.

Et resultat af indførelsen af 60% grænsen kan være, at mindre effektive fiskere tvinges på havet for at bevare deres fiskedage, hvorved samfundets ressourcer (både arbejdskraft og kapital) spildes ved et mindre effektivt fiskeri - En forbedring??

Et andet muligt resultat kan være, at nogle fiskere indgår en handel om salg af deres fiskedage, fordi det bedre kan svare sig for dem at sælge dagene én gang for alle, selvom de dermed mister retten til fremtidige dage, frem for at skulle ud og fiske. Det salg sikrer igen omfordelingen fra de mindre effektive fiskere til de mere driftige fiskere til glæde for samfundet.

I denne situation vil omfordelingen blive fremskudt, hvis grænsen fx flyttes til 80% i forhold til de 60%.

Men hvorfor indfører man så kravet om 60%? Når resultatet i bedste fald genskaber omfordelingen mellem fiskerne, som er gældende i dag, og i værste fald fører til et mindre effektivt fiskeri?

En grund kan være at retfærdigøre tildelingen af fiskedage! - Det skærer jo i ørerne på de fleste, at nogle fiskere videresælger de dage, som de har fået gratis fra Landsstyrið. Ved at kræve 60% anvendelse, så virker tildelingen mere rimelig ud ad til, men indførelsen kan føre til et ressourespild, som det nuværende system havde undgået.

En fordel ved det nye forslag er dog, at der bliver åbnet for flere videresalgsmuligheder mellem grupperne, men den samfundsmæssige gevinst havde været større i det nuværende system, hvis man gav grupperne de samme muligheder for at omfordele fiskedage mellem sig. Med 60% grænsen vil udskillelsen af mindre effektive fiskere ske langsommere end i dag, hvilket påvirker fiskeriets effektivitet negativt på sigt.

Et alternativt forslag til en forbedring af fiskedagesystemet er, at Landsstyrið sælger dagene på en auktion. Fordelen ved en auktion er, at den byder, som kan skabe mest værdi ud af en genstand, får genstanden.

Auktionen anvendes i dag i stor stil af det offentlige i USA og tildels Europa ved salg af fx olieområder, radiofrekvenser og licenser til mobiltelefoni. Baggrunden for dette valg er, at det - ligesom videresalget mellem fiskerne - sikrer, at den mest effektive fisker kommer på havet, og yderligere er der den fordel, som videresalget ikke har, at auktionen løser tildelingsproblemet, idet ingen gratis får en gave fra Landsstyrið, som de kan videresælge med en fortjeneste.

Et fiskedagesystem skaber en ekstra fortjeneste, idet der er begrænset adgang, og som tiden er, er det attraktivt at være inde. Dette skaber gevinsten ved videresalg af fiskedage. Hvis Landsstyrið i stedet selv solgte dagene, så vil Landsstyrið fjerne en del af ekstra gevinsten, som fiskedagesystemet skaber, således at ingen får en indtægt ved bare at videresælge noget, uden at levere noget.Yderligere vil auktionen give alle, som mener, at de kan drive et effektivt fiskeri, lige adgang til fiskeriet.

Det er vigtigt for et samfund, at erhvervspolitikken er tilrettelagt, så erhvervene hurtigt tilpasser sig ændringer i markedsbetingelserne, så samfundets ressourcer anvendes på den mest effektive måde. Indførelsen af 60% grænsen begrænser tilpasningen og kan føre til et ressourcespild. Et videresalg, som i dag eller en auktion sørger for, at den mest effektive fisker kan fange mest muligt, hvorved samfundets ressourcer bruges mest hensigtsmæssigt.

Flogvøllurin – nei

Sune Jacobsen

Ongantíð hevur tað verið so greitt sum nú, at flogvøllurin ongan góðan hevur átt í hesum samgonguskeiðnum. Hetta skuldi annars verið eitt lætt valskeið í so máta, tí fremstu mótstøðumenninir hava verið rættuliga tannleysir. Bjarni Djurholm gjørdist landsstýrismaður, og Poul Michelsen hevur ikki verið á tingi. Síðst nevndi stillar nú upp aftur, og verður hann valdur, kann tað í sær sjálvum verða ein forðing fyri, at nakað verður gjørt á umrødda øki.

Til ein fyrispurning um parkeringsøkið á flogvøllinum hevur Bjarni Djurholm svarað, at eingin peningur er avsettur til endamálið á fíggjarlógini. Landsstýrismaðurin hevði ikki gjørt sær nakrar tankar um henda trupulleika. Og hann hevur heldur ikki sagt nakað um, at hann ætlar at seta pening av á ta síðstu eykajáttanarlógini, sum henda samgonga fer at leggja fram um fáar dagar. Gera teir ikki tað, so hevur samgongan bitið høvdið av allari skomm.

Eingin hevði bygt ein trolara,ein línu- ella útróðrarbát uttan at tryggja sær, at peningur var tøkur til fiskireiðskapin. Tað er fiskireiðskapurin, sum er ein fyritreyt fyri, at manningin kann fáa hýru, og at skipið kann gjalda sínar útreiðslur. Á sama hátt er tað við undirsjóvartunlinum. Fiskireiðskapurin er parkeringsøkið á flogvøllinum.

Ná, sigur onkur. Tað, at einki parkeringsøki er, tað er ikki nakar trupulleiki fyri okkum í Vágum. Vit fáa altíð onkran, sum vit kenna, at koyra okkum á flogvøllin. Hetta er ein trupulleiki, sum tey, sum búgva uttan fyri okkara øki hava. Men so einfalt er hetta málið ikki.

Vit hava í fjølmiðlunum hoyrt, at tað eru 250 parkeringpláss á flogvallarøkinum. Tá undirsjóvartunnilin verður tikin í nýtslu, verður brúk fyri 1000 ella 750 afrtrat teimum, sum nú eru. 750 bilar svara til eitt vegastrekki, sum svarar til 3 km. Ella við øðrum orðum. Høvdu hesir verið parkeraðir frá flogvøllinum, hevði røðin rokkið yvir á Miðleitið. Og tað fer sjálvandi ikki at bera til.

Tað vil siga at hesi fólk fara framhaldandi at koyra í bussi, og tann ferðsluøking, sum annars skuldi verið av, at ferðandi trygt kundu sett bilin frá sær, verður ikki í fyrstu atløgu. Hetta vil føra við sær, at felagið, sum rekur undirsjóvartunnilin, fær nógv minni í inntøkum. Úrslitið av hesum verður, at vit, sum skulu nýta tunnilin, skulu gjslda nógv hægri bummgjald.

Parkeringsøkið hevur einki við danska statin at gera. Tað er eitt øki, sum landskasstýrið hevur ábyrgdina av. Heldur ikki hetta lítla málið kundu teir loysa. Tora somu menn yvir høvur at stilla upp aftur? Verið vís í, at eisini hetta málið skal Sambandsflokkurin loysa, um flokkurin kemur í samgongu eftir næsta val.